# Løgmansskrivstovan

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 13.12.2021 |
| Mál nr.: | 21/24059 |
| Málsviðgjørt: | NF |

**Fylgiskjal 1**

**Javntekstur**

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

| Galdandi orðingar | Løgtingslógaruppskotið |
|---|---|
| **§ 19.** *Stk. 1 ...*<br>*Stk. 2.* Avgerðir, tiknar við heimild í hesi lóg ella reglum, ásettar við heimild í hesi lóg, kunnu kærast til Kærunevndina í lendismálum.<br>*Stk. 3.* Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, at viðkomandi hevur fingið fráboðan um avgerðina.<br>*Stk. 4.* Avgerðir, sum Kærunevndin í lendismálum tekur í málum eftir hesi lóg og reglum, ásettar við heimild í lógini, eru endaligar innan fyrisitingina.<br>*Stk. 5.* Mál, ið einans snúgva seg um byggitøkniligar staðfestingar í sambandi við byggingina, kunnu ikki kærast til Kærunevndina.<br>*Stk. 6-7...* | **§ 1**<br>Í løgtingslóg nr. 60 frá 15. mai 2012 um at byggja bygningar o.a. (Byggilógin), verða gjørdar hesar broytingar:<br>**1.** Í § 19, stk. 2 verður "Kærunevndina í lendismálum" broytt til: "Føroya Kærustovn".<br>**2.** Í § 19, stk. 4 verður "Kærunevndin í lendismálum" broytt til: "Føroya Kærustovnur".<br>**3.** Í § 19, stk. 5 verður "Kærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn". |

| | |
|---|---|
| | **§ 2**<br><br>Í løgtingslóg nr. 11 frá 3. apríl 1970 um eigaraíbúðir, sum broytt við løgtingslóg nr. 33 frá 26. mai 1988, løgtingslóg nr. 55 frá 25. mai 2009 og løgtingslóg nr. 12 frá 11. februar 2013, verður § 11 orðað soleiðis: |
| **§ 11.** Landsstýrismaðurin kann leggja kærumyndugleikan í avgerðum, sum sambært hesi lóg kunnu kærast til landsstýrismannin, til kærunevndina í lendismálum, hvørs avgerðir eru endaligar innan fyrisitingina. | "**§ 11.** Avgerðir sambært hesi løgtingslóg kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið fráboðan um avgerðina." |
| | **§ 3**<br><br>Í løgtingslóg nr. 64 frá 11. desember 1962 um matrikulering og sundurbýti v.m., sum broytt við § 2 í løgtingslóg nr. 111 frá 13. desember 2006 og løgtingslóg nr. 82 frá 25. mai 2009 verður § 39 a orðað soleiðis: |
| **§ 39 a.** Landsstýrismaðurin kann leggja kærumyndugleikan í avgerðum, sum sambært hesi lóg kunnu kærast til landsstýrismannin, til kærunevndina í lendismálum, hvørs avgerðir eru endaligar innan fyrisitingina. | "**§ 39. a.** Avgerðir sambært hesi løgtingslóg kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið fráboðan um avgerðina." |
| | **§ 4**<br><br>Í løgtingslóg nr. 55 frá 16. august 1962 um tinglýsing, sum broytt við løgtingslóg nr. 24 frá 1. mai 1973, løgtingslóg nr. 37 frá 29. mai 1985, løgtingslóg nr. 39 frá 5. mai 1987, løgtingslóg nr. 59 frá 10. mai 2000, løgtingslóg nr. 164 frá 22. desember 2005, § 3 løgtingslóg nr. 111 frá 13. desember 2006, § 1 í løgtingslóg nr. 75 frá 25. mai 2009 og løgtingslóg nr. 70 frá 15. mai 2014, verður § 36 orðað soleiðis: |
| **§ 36.** Um avgerðir Tinglýsingarstovunnar eftir hesi lóg kann kærumál reisast innan 4 vikur. Kærufrestin verður roknað frá tí degi, viðkomandi hevur fingið frásøgn um | "**§ 36.** Avgerðir, sum kommuna hevur tikið sambært hesi løgtingslóg ella sambært byggisamtykt, kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at |

| | |
|---|---|
| avgerðina. Verður kæra reist, verður viðmerking um hetta beinanvegin førd inn í dagbók ella tingbók.<br>*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann leggja kærumyndugleikan eftir stk. 1 til kærunevndina í lendismálum, hvørs avgerðir eru endaligar innan fyrisitingina. | viðkomandi hevur fingið fráboðan um avgerðina." |
| § 10 a. Avgerð, sum ein kommuna hevur tikið sambært hesi lóg ella sambært byggisamtykt, kann verða kærd til landsstýrismannin.<br>*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann leggja kærumyndugleikan eftir stk.<br>1 til kærunevndina í lendismálum, hvørs avgerðir eru endaligar innan fyrisitingina. | **§ 5**<br><br>Í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum broytt við løgtingslóg nr. 48 frá 24. mai 1974, løgtingslóg nr. 59 frá 5. juni 1984, løgtingslóg nr. 80 frá 13. juni 1995, løgtingslóg nr. 57 frá 13. juni 1997, § 1 í løgtingslóg nr. 111 frá 13. desember 2006, løgtingslóg nr. 32 frá 30. apríl 2007, løgingslóg nr. 81 frá 25. mai 2009 og løgtingslóg nr. 19 frá 18. mars 2013, verður § 10 a orðað soleiðis:<br><br>"**§ 10 a.** Avgerðir Tinglýsingarstovunnar sambært hesi løgtingslóg kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið fráboðan um avgerðina." |
| **§ 8.** Landsstýrismaðurin kann leggja kærumyndugleikan í avgerðum, sum sambært hesi lóg kunnu kærast til landsstýrismannin, til kærunevndina í lendismálum, hvørs avgerðir eru endaligar innan fyrisitingina. | **§ 6**<br><br>Í Lov nr. 69 af 7. maj 1881 om Forpligtelse til Jords Afgivelse til offentlige Veje, Havne og Landingssteder, samt til offentlige Skoler på Færøerne, sum broytt við midlertidig bestemmelse nr. 45 frá 30. oktober 1941, midlertidig bestemmelse nr. 17 frá 20. januar 1944 og § 4 í løgtingslóg nr. 111 frá 13. desember 2006, verður § 8 orðað soleiðis:<br><br>"**§ 8.** Avgerðir sambært hesi løgtingslóg kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið fráboðan um avgerðina." |

| | |
|---|---|
| **§ 43.** *Stk. 1-2 ...*<br>*Stk. 3.* Fyritøkan skal almannakunngera somu upplýsingar, sum eru nevndar í stk. 1, á sínari møguligu heimasíðu á einum staði, har tær natúrliga hoyra heima. Almannakunngeringin skal fremjast skjótast gjørligt, og í seinasta lagi 3 gerandisdagar eftir, at fyritøkan hevur móttikið kunning um tiltøkini, ella í seinasta lagi, tá hetta verður kravt eftir lov om værdipapirhandel v.m., sum lógin er sett í gildi í Føroyum við kongligari fyriskipan. Samstundis sum almannakunngeringin verður framd, skal fyritøkan seta inn eitt leinki, sum gevur beinleiðis atgongd til tiltøkini, á forsíðuni á einari møguligari heimasíðu hjá fyritøkuni á ein sjónligan hátt, og tað skal framganga av leinkinum og einum møguligum atknýttum teksti, at talan er um tiltøk frá Tryggingareftirlitinum. Ger fyritøkan viðmerkingar til tiltøkini, skulu hesar síggjast í framhaldi av hesum, og viðmerkingarnar skulu vera greitt skildar frá boðunum. Burturtøka av leinkinum á forsíðuni og av upplýsingum á møguligu heimasíðuni hjá fyritøkuni skal gerast eftir somu meginreglum, sum fyritøkan nýtir í sambandi við aðrar fráboðanir, tó í fyrsta lagi tá leinkið og upplýsingarnar hava ligið á heimasíðuni í 3 mánaðir, og í fyrsta lagi aftaná fyrstkomandi aðalfund ella umboðsmannafund. Skyldan hjá fyritøkuni at almannakunngera upplýsingarnar á heimasíðuni hjá fyritøkuni er bert galdandi fyri løgfrøðiligar persónar. Verða tiltøkini, sum almannakunngerast eftir stk. 1, 1. pkt., kærd til Vinnukærunevndina ella dómstólarnar, skal hetta síggjast á almannakunngeringini hjá Tryggingareftirlitinum, og tað eftirfylgjandi úrslitið av úrskurðinum hjá Vinnukærunevndini ella dómstólunum, skal | **§ 7**<br><br>Í løgtingslóg nr. 190 frá 18. desember 2020 um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (Hvítvasklógin), verða gjørdar hesar broytingar:<br><br>**1.** Í § 43, stk. 3, 7. pkt. verður "Vinnukærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn", og "Vinnukærunevndini" broytt til: "Føroya Kærustovni". |

| | |
|---|---|
| somuleiðis almannakunngerast á heimasíðuni hjá Tryggingareftirlitinum skjótast gjørligt.<br>*Stk. 4-5 ...*<br><br>**§ 50.** *Stk. 1-2 ...*<br>*Stk. 3.* Fyritøkan skal almannakunngera somu upplýsingar, sum eru fevndir av stk. 1, á møguligu heimasíðu fyritøkunnar á einum hóskandi stað. Almannakunngeringin skal verða gjørd skjótast gjørligt, og í seinasta lagi 3 gerandisdagar aftaná, at fyritøkan hevur móttikið fráboðan um tiltakið, ella í seinasta lagi, sum kravt eftir lov om værdipapirhandel m.v., sum lógin er sett í gildi við kongligari fyriskipan. Samstundis við almannakunngeringina, skal fyritøkan seta eitt leinki, sum gevur beinleiðis atgongd til tiltakið, á forsíðuna á heimasíðuni hjá fyritøkuni á ein sjónligan hátt, og av leinkinum og einum møguliga tilknýttum teksti skal greitt ganga fram, at tað er talan um eitt tiltak frá Trygginareftirlitinum. Ger fyritøkan viðmerkingir til tiltakið, skal tað gerast í framhaldi av tí, og viðmerkingarnar skulu vera greitt skildar frá tiltakinum. Striking av leinkinum av møguligu heimasíðu fyritøkunnar skal gerast eftir somu meginreglum, sum fyritøkan nýtir fyri aðrar fráboðanir, tó í fyrsta lagi, tá leinkið hevur verið á heimasíðuni í 3 mánaðir, og í fyrsta lagi aftan á fyrst komandi aðalfund ella umboðsráðsfund. Skyldan hjá fyritøkuni at almannakunngera upplýsingar á heimsíðuni er bert galdandi fyri løgfrøðiligar persónar. Verður tiltakið, sum verður almannakunngjørt sambært stk. 1, 1. pkt., skotið inn fyri Vinnukærunevndina ella dómstólin, skal hetta síggjast í almannakunngeringini hjá Skráseting Føroya, og seinni úrslitið av avgerðini hjá Vinnukærunevndini ella dómstólinum skal eisini almannakunngerast á heimasíðuni hjá Skráseting Føroya skjótast gjørligt.<br>*Stk. 4-7 ...*<br><br>**§ 57.** Avgerðir, tiknar av Tryggingareftirlitinum og Skráseting Føroya, sambært hesi løgtingslóg og | **2.** Í § 50, stk. 3, 7. pkt. verður “Vinnukærunevndina” broytt til: “Føroya Kærustovn”, og “Vinnukærunevndini” broytt til: “Føroya Kærustovni”. |

| | |
|---|---|
| reglum, ásettar sambært løgtingslógini, kunnu av tí, sum avgerðin vendir sær til, verða lagdar fyri Vinnukærunevndina í seinasta lagi 4 vikur eftir, at avgerðin er kunngjørd fyri viðkomandi. | **3.** Í § 57 verður "Vinnukærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn". |
| **§ 27.** Avgerðir hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, tiknar við heimild í hesi løgtingslóg ella reglum, givnar við heimild í hesi løgtingslóg, kunnu kærast til Vinnukærunevndina, sum tekur endaliga fyrisitingarliga avgerð í málinum. Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, at avgerðin er fráboðað. | **§ 8**<br><br>Í løgtingslóg nr. 49 frá 30. apríl 2018 um djóravælferð (Djóravælferðarlógin), sum broytt við § 77 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verður § 27 orðað soleiðis:<br><br>"**§ 27.** Avgerðir hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, tiknar við heimild í hesi løgtingslóg ella reglum, givnar við heimild i hesi løgtingslóg, kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið fráboðan um avgerðina." |
| **§ 25.** Eigarar av fjarskiftiskervi og veitarar av fjarskiftiskervum ella fjarskiftistænastum og starvsfólk teirra og fyrrverandi starvsfólk, umframt starvsfólk á Fjarskiftiseftirlitinum og í Vinnukærunevndini mugu ikki ógrundað lata víðari ella gagnnýta upplýsingar um kervisnýtsluna ella tænastunýtsluna hjá øðrum ella um innihaldið í hesum, sum tey fáa kunnleika til í sambandi við viðkomandi útboð av fjarskiftiskervum ella fjarskiftistænastum. Tað liggur eisini á teimum at seta neyðug tiltøk í verk til tess at fyribyrgja, at óviðkomandi fáa atgongd til upplýsingar um innihald ella nýtslu av fjarskifti.<br>*Stk. 2 ...*<br><br>**§ 47.** *Stk. 1-2 ...* | **§ 9**<br><br>Í løgtingslóg nr. 72 frá 22. mai 2015 um fjarskifti (Fjarskiftislógin), sum broytt við § 72 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verða gjørdar hesar broytingar:<br><br>**1.** Í § 25, stk. 1, 1. pkt. verður "Vinnukærunevndini" broytt til: "Føroya Kærustovni". |

| | |
|---|---|
| *Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur, ið geva almennum myndugleikum, sum eru heimilaðir at gera uppgávur eftir stk. 1, heimild at áseta reglur, nevndar í § 46, stk. 2 og 3. Í hesum sambandi kunnu eisini ásetast reglur um kæru til Vinnukærunevndina sambært § 71, stk. 1.<br>*Stk. 4.* Verður avgerðarmyndugleiki latin almennum myndugleikum, ella privatum, eftir stk. 1, skal landsstýrismaðurin áseta reglur um kæru til Vinnukærunevndina sambært § 71, stk. 1. | **2.** Í § 47, stk. 3 og 4 verður "Vinnukærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn". |
| **§ 67.** Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at skrivligt samskifti við Fjarskiftiseftirlitið og Vinnukærunevndina um viðurskifti, sum eru fevnd av hesi lóg ella av reglum, ásettum við heimild í hesi lóg, skal vera talgilt.<br>*Stk. 2-3 ...* | **3.** Í § 67, stk. 1 verður "Vinnukærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn". |
| **§ 68.** Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at Fjarskiftiseftirlitið og Vinnukærunevndin kunnu flýggja út avgerðir og onnur skjøl eftir hesi lóg uttan undirskrift, maskinskrivaðari ella líknandi undirskrift, ella við nýtslu av tøkni, sum tryggjar eintýðuga eyðmerking av viðkomandi, sum hevur útgivið avgerðina ella skjalið. Tìlík skjøl eru at javnmeta við skjøl, sum eru persónliga undirskrivað. | **4.** Í § 68, 1. pkt. verður "Vinnukærunevndin" broytt til: "Føroya Kærustovnur". |
| **§ 71.** Vinnukærunevndin tekur avgerð í málum, sum eftir lógini ella reglum, ásettar við heimild í hesi lóg, eru lagdar til Vinnukærunevndina.<br>*Stk. 2.* Avgerðir hjá Fjarskiftiseftirlitinum kunnu skjótast inn fyri Vinnukærunevndina, sum tekur endaliga fyrisitingarliga avgerð í málinum. Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, kærarin fekk kunnleika til avgerðina hjá Fjarskiftiseftirlitinum. | **5.** § 71 verður orðað soleiðis:<br><br>"**§ 71.** Føroya Kærustovnur tekur avgerð í málum, sum eftir løgtingslógini ella reglum, ásettar við heimild í løgtingslógini, eru lagdar til Føroya Kærustovn.<br>*Stk. 2.* Avgerðir hjá Fjarskiftiseftirlitinum kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið fráboðan um avgerðina." |

| | |
|---|---|
| **§ 18.** Leggur landsstýrismaðurin heimildir sínar eftir hesi løgtingslóg til annan myndugleika at fyrisita, tá kann hann áseta reglur um kæru, undir hesum at avgerðir myndugleikans ikki kunnu kærast til landsstýrismannin, men kunnu kærast til Vinnukærunevndina, og at ávísar avgerðir ikki kunnu kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika. | **§ 10**<br><br>Í løgtingslóg nr. 21 frá 16. mars 2012 um havnaloðsing (Loðslógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 143 frá 18. desember 2013, løgtingslóg nr. 65 frá 29. mai 2017, løgtingslóg nr. 63 frá 9. mai 2019 og § 68 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verður í § 18 "Vinnukærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn". |
| **§ 322.** Avgerðir, tiknar av Skráseting Føroya eftir lógini ella eftir fyriskipanum, givnar við heimild í lógini, kunnu kærast til Vinnukærunevndina í seinasta lagi 4 vikur eftir, at avgerðin er fráboðað viðkomandi sbr. tó stk. 2.<br>*Stk. 2.* Avgerðir, sum Skráseting Føroya tekur sum úrslit av, at farið verður út um tær freistir, ið eru ásettar í § 40, stk. 1, § 165, stk. 5, § 177, stk. 2, § 191, § 225, stk. 2, og § 231, stk. 2, um ásetan av freist eftir § 16, stk. 1 og § 17, stk. 2, umframt avgerðir eftir § 93, stk. 2-4, § 225, stk. 1, § 226, § 232, stk. 2 og § 302, stk. 1, nr. 2-4, kunnu tó ikki kærast til hægri fyrisitingarligan myndugleika. | **§ 11**<br><br>Í løgtingslóg nr. 73 frá 31. mai 2011 um parta- og smápartafeløg (Vinnufelagalógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 56 frá 6. mai 2016, § 1 í løgtingslóg nr. 44 frá 26. apríl 2019, § 1 í løgtingslóg nr. 45 frá 26. apríl 2019 og løgtingslóg nr. 57 frá 4. mai 2021, verður í § 322, stk.1 "Vinnukærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn". |
| **§ 44 a.** *Stk. 1-4 ...*<br>*Stk.* 5. Verður ein avgerð almannakunngjørd, áðrenn kærufreistin í § | **§ 12**<br><br>Í løgtingslóg nr. 45 frá 11. mai 2009 um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir (Grannskoðaralógin), sum broytt við § 4 í løgtingslóg nr. 69 frá 27. mai 2011, løgtingslóg nr. 28 frá 26. mars 2012, løgtingslóg nr. 76 frá 22. mai 2015 og løgtingslóg nr. 51 frá 4. mai 2021, verða gjørdar hesar broytingar: |

| | |
|---|---|
| 48, stk. 1 er farin, ella verður avgerðin kærd til Vinnukærunevndina, skal í eini almannakunngerð, sambært stk. 1, 1. pkt., verða upplýst um støðuna og um úrslitið av kæruni til Vinnukærunevndina.<br><br>§ **48.** Avgerðir, sum Skráseting Føroya hevur tikið sambært løgtingslógini ella reglum, givnum við heimild í løgtingslógini, ella sambært Europa-Parlamentets og Rådets forordning (EU) nr. 537/2014 af 16. april 2014 om specifikke krav til revision af virksomheder af interesse for offentligheden, kunnu verða lagdar fyri Vinnukærunevndina í seinasta lagi 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið boð um avgerðina.<br>*Stk. 2-3 ...* | **1.** Í § 44 a, stk. 5 verður "Vinnukærunevndina" tvær staðni broytt til: "Føroya Kærustovn".<br><br>**2.** Í § 48, stk. 1 verður "Vinnukærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn". |
| **§ 24.** Leggur landsstýrismaðurin heimildir sínar eftir lógini til ein myndugleika undir honum, kann hann áseta, at avgerðir, tiknar av myndugleikanum, kunnu kærast til Vinnukærunevndina. | **§ 13**<br><br>Í løgtingslóg nr. 83 frá 25. mai 2009 um aling av fiski v.m., sum broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 14. desember 2012, løgtingslóg nr. 50 frá 30. apríl 2018 og løgtingslóg nr. 65 frá 14. mai 2020, verður í § 24 "Vinnukærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn". |
| **§ 5.** Spurningurin, um arbeiðsgevarin hevur hildið upplýsingarskylduna eftir lógini, verður avgjørdur av Vinnukærunevndini. | **§ 14**<br><br>Í løgtingslóg nr. 20 frá 8. mai 2008 um skyldu arbeiðsgevarans at fráboða løntakaranum treytirnar fyri setanarviðurskiftunum verður í § 5 "Vinnukærunevndini" broytt til: "Føroya Kærustovni". |
| **§ 214.** Avgerðir tiknar av Tryggingareftirlitinum ella av Skráseting Føroya eftir lógini ella reglum givnar við | **§ 15**<br><br>Í løgtingslóg nr. 55 frá 9. juni 2008 um tryggingarvirksemi, sum broytt við løgtingslóg nr. 69 frá 27. mai 2011, løgtingslóg nr. 137 frá 20. desember 2012, løgtingslóg nr. 53 frá 12. mai 2015, løgtingslóg nr. 65 frá 30. apríl 2018, |

| | |
|---|---|
| lógini kunnu av tí, sum avgerðin viðvíkur, leggjast fyri Vinnukærunevndina í seinasta lagi fýra vikur eftir, at avgerðin er fráboðað viðkomandi.<br>*Stk. 2 ...* | løgtingslóg nr. 45 frá 26. apríl 2019, § 67 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020 og løgtingslóg nr. 43 frá 22. apríl 2021, verður í § 214, stk. 1 “Vinnukærunevndina” broytt til: “Føroya Kærustovn”. |
| **§ 19.** Avgerðir, sum Arbeiðseftirlitið tekur, kunnu kærast til landsstýrismannin innan 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið boð um avgerðina.<br>*Stk. 2.* Kæra er steðgandi, til kærumyndugleikin hevur tikið avgerð í málinum.<br>*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann í kunngerð leggja kærumyndugleikan eftir stk. 1 til annan fyrisitingarligan myndugleika og kann samstundis áseta, at avgerðir hjá kærumyndugleikanum ikki kunnu kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika. | **§ 16**<br><br>Í løgtingslóg nr. 28 frá 30. apríl 2007 um spreingievni og spreingiarbeiði v.m., sum broytt við § 62 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verður § 19 orðað soleiðis:<br><br>“**§ 19.** Avgerðir sum Arbeiðseftirlitið hevur tikið sambært hesi løgtingslóg kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið fráboðan um avgerðina. Kæra er steðgandi, til Føroya Kærustovnur hevur tikið avgerð í málinum.” |
| **§ 19.** *Stk. 1 ...*<br>*Stk. 2.* Kappingareftirlitið skal almannakunngera:<br>1) -<br>2) -<br>3) -<br>4) -<br>5) Avgerðir hjá Vinnukærunevndini í kappingarmálum.<br>6) Dómar í rættarmálum, har Kappingareftirlitið, Kappingarráðið ella Vinnukærunevndin í kappingarmálum eru partar.<br>*Stk. 3-5 ...*<br><br>**§ 21.** Landsstýrismaðurin í kappingarmálum kann gera reglur um at nýta elektróniskt samskifti til og frá Kappingarráðnum, Kappingareftirlitinum og Vinnukærunevndini í kappingarmálum og í hesum sambandi reglur um elektróniska undirskrift. | **§ 17**<br><br>Í løgtingslóg nr. 35 frá 3. mai 2007 um kapping, sum broytt við § 7 í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008 og løgtingslóg nr. 35 frá 27. apríl 2012, verða gjørdar hesar broytingar:<br><br>**1.** Í § 19, stk. 2, nr. 5 verður “Vinnukærunevndini” broytt til: “Føroya Kærustovni”.<br><br>**2.** Í § 19, stk. 2, nr. 6 verður “Vinnukærunevndin” broytt til: “Føroya Kærustovnur”.<br><br>**3.** Í § 21 verður “Vinnukærunevndini” broytt til: “Føroya Kærustovni”. |

| | |
|---|---|
| **§ 27.** Avgerðir, tiknar av Kappingarráðnum eftir § 2, stk. 1, § 3, 1. pkt., § 4, § 6, stk. 1 og 4, 1. pkt., § 7, stk. 1-3, § 8, stk. 2, stk. 4, 2. pkt. og stk. 5-6, § 9, stk. 1, 1. pkt., § 10, stk. 2, § 11, stk. 1-2, stk. 4, 1. pkt. og stk. 5, § 12, stk. 1 og stk. 6, 1. pkt., § 15, stk. 1-3, § 16, stk. 1, § 17, stk. 5, § 18, stk. 1-5 og stk. 7, § 19, stk. 4, § 22 og § 23, stk. 2-3 kunnu kærast til Vinnukærunevndina í kappingarmálum.<br>*Stk. 2 ...*<br>*Stk. 3.* Avgerð eftir 20, stk. 1 kann ikki kærast til Vinnukærunevndina.<br>*Stk. 4.* Kæra um avgerð eftir § 19, stk. 4 hevur steðgandi virknað. Kappingarráðið ella Vinnukærunevndin kann avgera, at kærur um aðrar avgerðir hava steðgandi virknað.<br>*Stk. 5.* Vinnukærunevndin skal taka avgerð í málinum í seinasta lagi seks vikur eftir, at málið er lagt fyri hana. | **4.** Í § 27, stk. 1 verður "Vinnukærunevndina í kappingarmálum" broytt til: "Føroya Kærustovn".<br><br>**5.** Í § 27, stk. 3 verður "Vinnukærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn".<br><br>**6.** Í § 27, stk. 4 og 5 verður "Vinnukærunevndin" broytt til: "Føroya Kærustovnur". |
| **§ 28.** Avgerðir, tiknar av Kappingarráðnum eftir hesi lóg, kunnu ikki leggjast fyri annan fyrisitingarligan myndugleika enn Vinnukærunevndina og kunnu ikki leggjast fyri rættin, fyrr enn úrskurður frá Vinnukærunevndini er til skjals.<br>*Stk. 2.* Kæra um avgerð kann verða skotin inn fyri Vinnukærunevndina innan 4 vikur frá tí, at avgerðin er kunngjørd tí, sum hon viðvíkur. Tá serligar orsøkir tala fyri, kann Vinnukærunevndin víkja frá kærufreistini.<br>*Stk. 3.* Avgerð, tikin av Vinnukærunevndini, kann leggjast fyri Føroya Rætt í seinasta lagi 8 vikur frá tí, at avgerðin er kunngjørd tí, sum hon viðvíkur. Verður ikki kært innan ásettu tíðarfreistina, er avgerð Vinnukærunevndarinnar endalig. | **7.** Í § 28, stk. 1 verður "Vinnukærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn" og "Vinnukærunevndini" broytt til: "Føroya Kærustovni".<br><br>**8.** Í § 28, stk. 2, 1. pkt. verður "Vinnukærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovni" og í 2. pkt verður "Vinnukærunevndin" broytt til: "Føroya Kærustovnur".<br><br>**9.** Í § 28, stk. 3, 1. pkt. verður "Vinnukærunevndini" broytt til: "Føroya Kærustovni" og í 2. pkt. verður "avgerð Vinnukærunevndarinnar" broytt til: "avgerðin hjá Føroya Kærustovni". |

| | |
|---|---|
| **§ 31.** Um ikki harðari revsing er uppiborin eftir aðrari lóggávu, verður við bót revsaður tann, sum tilvitað ella av grovum ósketni<br>1) -<br>2) -<br>3) -<br>4) -<br>5) -<br>6) -<br>7) -<br>8) -<br>9) -<br>10) -<br>11) gevur Kappingareftirlitinum, Kappingarráðnum ella Vinnukærunevndini skeivar ella villleiðandi upplýsingar ella tigur um viðurskifti, sum hava týdning fyri mál ella kanning eftir § 24 a, sum upplýsingar verða savnaðar til.<br>*Stk. 2-5* ... | **10.** Í § 31 , stk. 1, nr. 11 verður "Vinnukærunevndini" broytt til: "Føroya Kærustovni". |
| **§ 32.** *Stk. 1-3* ...<br>*Stk. 4.* Mál eftir kappingarlógini, smb. løgtingslóg nr. 83 frá 6. juni 1997, sum broytt við løgtingslóg nr. 81 frá 3. desember 1998, ið ikki eru liðugt viðgjørd, tá lógin kemur í gildi, detta burtur. Hetta er ikki galdandi fyri mál, løgd fyri Vinnukærunevndina í kappingarmálum.<br>*Stk. 5* ... | **11.** Í § 32, stk. 4, 2. pkt. verður "Vinnukærunevndina í kappingarmálum" broytt til: "Føroya Kærustovn". Skal § 32, stk. 4 strikast? Sannlíkt ikki viðkomandi longur? |
| **§ 19.** Avgerðir, sum Arbeiðseftirlitið tekur, kunnu kærast til landsstýrismannin innan 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið boð um avgerðina.<br>*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann í kunngerð leggja kærumyndugleikan eftir stk. 1 til annan fyrisitingarligan myndugleika og kann samstundis áseta, at avgerðir hjá kærumyndugleikanum ikki kunnu kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika. | **§ 18**<br><br>Í løgtingslóg nr. 46 frá 15. mai 2007 um kavaravinnu og kavaraútgerð, sum broytt við § 64 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verður § 19 orðað soleiðis:<br><br>"**§ 19.** Avgerðir sum Arbeiðseftirlitið hevur tikið sambært hesi løgtingslóg kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið fráboðan um avgerðina. Kæra er steðgandi, til Føroya Kærustovnur hevur tikið avgerð í málinum." |

| | |
|---|---|
| *Stk. 3.* Kæra er steðgandi, til kærumyndugleikin hevur tikið avgerð í málinum. | |
| **§ 18.** Leggur landsstýrismaðurin heimildir sínar eftir hesi lóg til ein myndugleika undir honum, kann hann áseta, at avgerðir, tiknar av myndugleikanum, kunnu kærast til Vinnukærunevndina. | **§ 19**<br><br>Í løgtingslóg nr. 59 frá 7. juni 2007 um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni (Elveitingarlógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 104 frá 20. november 2007, § 10 í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, løgtingslóg nr. 79 frá 7. juni 2012 og løgtingslóg nr. 184 frá 21. desember 2018, verður í § 18 "Vinnukærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn". |
| **§ 62.** *Stk. 1 ...*<br>*Stk. 2.* Andre afgørelser truffet af den færøske registreringsmyndighed i henhold til loven eller forskrifter udstedt i medfør af loven bortset fra afgørelser som fondsmyndighed, jf. § 57, stk. 1, 1. pkt., kan indbringes for Vinnukærunevndin senest 4 uger efter, at afgørelsen er meddelt den pågældende.<br>*Stk. 3 ...* | **§ 20**<br><br>Í anordning nr. 1113 af 20. september 2007 om ikrafttræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde, sum broytt við § 4 í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, § 4 í løgtingslóg nr. 52 frá 11. mai 2009, § 5 í løgtingslóg nr. 75 frá 25. mai 2009, § 3 í løgtingslóg nr. 69 frá 27. mai 2011, § 3 í løgtingslóg nr. 45 frá 26. apríl 2019, og § 3 í løgtingslóg nr. 57 frá 4. mai 2021, verður í § 62, stk. 2 "Vinnukærunevndin" broytt til: "Føroya Kærustovn". |
| **§ 15 e.** *Stk. 1-2 ...*<br>*Stk. 3.* Aðrar avgerðir, tiknar av Skráseting Føroya eftir lógini, ella eftir reglum, ásettar við heimild í lógini, kunnu kærast til Vinnukærunevndina í seinasta lagi 4 vikur eftir, at avgerðin er fráboðað viðkomandi.<br>*Stk. 4 ...* | **§ 21**<br><br>Í anordning nr. 1114 af 20. september 2007 om ikrafttræden for Færøerne af lov om visse erhvervsdrivende virksomheder (Vinnufyritøkulógin), sum broytt við § 3 í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, § 3 í løgtingslóg nr. 52 frá 11. mai 2009, § 2 í løgtingslóg nr. 69 frá 27. mai 2011, løgtingslóg nr. 25 frá 16. mars 2012, løgtingslóg nr. 43 frá 6. mai 2016, § 3 í løgtingslóg nr. 44 frá 26. apríl 2019, § 2 í løgtingslóg nr. 45 frá 26. apríl 2019 og § 2 í løgtingslóg nr. 57 frá 4. mai 2021, verður í § 15 e , stk. 3 "Vinnukærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn". |

| | |
|---|---|
| **§ 2.** *Stk. 1-2 ...*<br>*Stk. 3.* Leggur landsstýrismaðurin heilt ella partvíst sínar heimildir eftir hesi lóg til fyritingarligan myndugleika undir landsstýrismanninum, kann landsstýrismaðurin samtundis áseta, at avgerðir, sum hesin myndugleikin hevur tikið, kunnu kærast til eina kærunevnd, hvørs avgerðir ikki kunnu kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um kærur, heruppií reglur um gjald fyri kæruviðgerð. | **§ 22**<br><br>Í løgtingslóg nr. 103 frá 20. november 2007 um ognartøku og avhendan til flogferðsluendamál verður í § 2, stk. 3 "eina kærunevnd" broytt til: "Føroya Kærustovn". |
| **§ 163.** Afgørelser truffet af den færøske registreringsmyndighed i henhold til loven, bekendtgørelser udstedt i medfør af loven og regnskabsstandarder i henhold til §§ 136 og 137 kan indbringes for Vinnukærunevndin senest 4 uger efter, at afgørelsen er meddelt den pågældende, sbr. tó stk. 2 og 3.<br>*Stk. 2-4 ...* | **§ 23**<br><br>Í anordning nr. 1355 af 9. desember 2007 om ikrafttræden for Færøerne af årsregnskabsloven (Ársroknskaparlógin), sum broytt við § 5 í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2009, § 1 í løgtingslóg nr. 69 frá 27. mai 2011, § 1 í løgtingslóg nr. 136 frá 11. desember 2013, løgtingslóg nr. 50 frá 12. mai 2015 og løgtingslóg nr. 45 frá 6. mai 2016, verður í § 163 , stk. 1 "Vinnukærunevndin" broytt til: "Føroya Kærustovn". |
| **§ 3.** Leggur landsstýrismaðurin sínar heimildir eftir lógini til ein myndugleika undir honum, kann hann áseta, at avgerðir, tiknar av myndugleikanum, kunnu kærast til Vinnukærunevndina. Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um høvið hjá einum myndugleika at taka upp aftur til viðgerðar eitt mál, sum er kært.<br>*Stk. 2-3 ...* | **§ 24**<br><br>Í løgtingslóg nr. 58 frá 22. apríl 2003 um innflutning og hald av vandamiklum djórum o.ø., sum broytt við § 15 í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, verður í § 3, stk. 1, 1. pkt.,stk. 2, 2. pkt. og stk. 3 "Vinnukærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn". |

| | |
|---|---|
| **§ 46.** Leggur landsstýrismaðurin sínar heimildir eftir lógini til ein myndugleika undir honum, kann hann áseta, at avgerðir, tiknar av myndugleikanum, kunnu kærast til Vinnukærunevndina.<br>*Stk. 2.* Eftir samráðing við avvarðandi landsstýrismann, kann landsstýrismaðurin áseta reglur um, at aðrir almennir myndugleikar ella stovnar skulu vera við til at røkja uppgávur eftir lógini. Landsstýrismaðurin kann áseta, at avgerðir hjá hesum stovnum ella myndugleikum kunnu kærast til Vinnukærunevndina.<br>*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at privatir stovnar skulu vera við til at røkja uppgávur sambært lógini ella reglum við heimild í lógini, og um kæru um avgerðirnar til Vinnukærunevndina. | **§ 25**<br><br>Í løgtingslóg nr. 16 frá 23. februar 2001 um djórasjúkur, sum broytt við § 13 í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, løgtingslóg nr. 105 frá 13. juli 2017 og § 56 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verður í § 46, stk. 1, stk. 2, 2. pkt. og stk. 3 "Vinnukærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn". |
| **§ 14 a.** vgerðir, tiknar av Skráseting Føroya eftir hesi lóg, kunnu kærast til Vinnukærunevndina í seinasta lagi 4 vikur eftir, at avgerðin er boðað viðkomandi. | **§ 26**<br><br>Í løgtingslóg nr. 64 frá 27. apríl 2001 um vinnu, sum broytt við § 1 í løgtingslóg nr. 55 frá 16. mai 2006, § 6 í løgtingslóg nr. 18 fra 8. mai 2008 og § 9 í løgtingslóg nr. 75 frá 25. mai 2009, verður § 14 a orðað soleiðis:<br><br>"**§ 14 a.** Avgerðir tiknar av Skráseting Føroya sambært hesi løgtingslóg kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið fráboðan um avgerðina." |
| **§ 20 a.** 2) Leggur landsstýrismaðurin sínar heimildir eftir hesi lóg til ein myndugleika undir honum, kann hann áseta, at avgerðir, tiknar av myndugleikanum, kunnu kærast til Vinnukærunevndina. | **§ 27**<br><br>Í løgtingslóg nr. 135 frá 18. oktober 2001 um postvirksemi, sum broytt við § 9 í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008 og løgtingslóg nr. 42 frá 7. mai 2010, verður í § 20 a "Vinnukærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn". |

| | |
|---|---|
| **§ 63.** Avgerðir, tiknar eftir hesi lóg ella eftir reglum, settar við heimild í lógini, kunnu kærast til Vinnukærunevndina innan 4 vikur frá tí degi, at viðkomandi hevur fingið fráboðan um avgerðina. Vinnukærunevndin ger av, um kæran skal hava steðgandi virknað. | **§ 28**<br><br>Í løgtingslóg nr. 70 frá 11. mai 2000 um arbeiðsumhvørvi, sum broytt við § 18 í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, løgtingslóg nr. 40 frá 13. mai 2013, løgtingslóg nr. 52 frá 4. mai 2017 og § 55 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verður § 63 orðað soleiðis:<br><br>"**§ 63.** Avgerðir sambært hesi løgtingslóg ella reglum givnar við heimild í løgtingslógini kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið fráboðan um avgerðina. Føroya Kærustovnur ger av, um kæran skal hava steðgandi virknað." |
| **§ 32.** Heimildir, ið landsstýrismaðurin hevur eftir §§ 2-7, 13, 16, 23 og §§ 24-31, kann hann lata til annan myndugleika. Avgerðir hjá hesum myndugleika kunnu kærast til Vinnukærunevndina. | **§ 29**<br><br>Í løgtingslóg nr. 40 frá 23. apríl 1999 um djóralæknavirksemi v.m., sum broytt við § 14 í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, verður í § 32, 2. pkt. "Vinnukærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn". |
| **§ 64 m.** Avgerðir hjá Akstovuni, tiknar við heimild í hesi lóg, ella reglum, givnar við heimild í hesi lóg, kunnu kærast til Vinnukærunevndina innan 4 vikur eftir, at avgerðin er fráboðað viðkomandi.<br>*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann leggja uppgávur sambært lógini til annan almennan stovn ella til ein einskildan felagsskap og avgera, at kærur um avgerðir hjá hesum kunnu kærast til Vinnukærunevndina. | **§ 30**<br><br>Í løgtingslóg um ferðslu sbrt. løgtingslógarkunngerð nr. 14 frá 2. mars 1988 um ferðslu, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 179 frá 17. desember 2020, verður í § 64 m, stk. 1 og 2 "Vinnukærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn". |
| **§ 7 a.** Leggur landsstýrismaðurin sínar heimildir eftir lógini til ein myndugleika undir honum, kann hann áseta, at avgerðir hjá myndugleikanum kunnu kærast til Vinnukærunevndina. | **§ 31**<br><br>Í løgtingslóg nr. 51 frá 25. juli 1972 um landsvegir, sum broytt við løgtingslóg nr. 111 frá 17. november 1982, løgtingslóg nr. 167 frá 21. desember 2001 og § 16 í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, verður í § 7 a "Vinnukærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn". |

| | |
|---|---|
| **§ 3 h.** *Stk. 1-2 ...*<br>*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann eisini leggja sín kærumyndugleika til eina kærunevnd, hvørs avgerðir eru endaligar innan fyrisitingina. | **§ 32**<br><br>Í løgtingslóg nr. 43 frá 22. mai 1969 um vápn o.a., sum broytt við løgtingslóg nr. 54 frá 12. mai 1980, løgtingslóg nr. 81 frá 22. mai 2015, § 40 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020 og løgtingslóg nr. 158 frá 20. november 2020, verður í § 3 h, stk 3 "eina kærunevnd" broytt til: "Føroya Kærustovn". |
| **§ 8.** Ein nevnd viðger og tekur avgerðir sambært hesi lóg.<br>*Stk. 2.* Í nevndini eru 3 av landsstýrismanninum tilnevndir limir. Formaðurin skal vera lógkønur. Næstformaðurin skal vera roknskaparkønur. Ein av limunum skal vera fyrisitingarkønur.<br>*Stk. 3* Á sama hátt tilnevnir landsstýrismaðurin 3 varalimir.<br>*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin útnevnir formannin og næstformannin, ið eru ávikavist lógar- og roknskaparkønir. Starvstíðin hjá nevndini er 4 ár.<br>*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin skipar fyri, at nevndin fær neyðuga skrivarahjálp, og ger av, um fastur skrivari skal setast í starv, ella um skrivaraarbeiðið skal liggja hjá almennum kærustovni.<br>*Stk. 6.* Landsstýrismaðurin ger starvsskipan fyri nevndina.<br>*Stk. 7.* Nevndin hevur heimild at útvega sær neyðugar upplýsingar um fíggjarstøðuna hjá umsøkjara og annars upplýsingar, ið eru neyðugar fyri viðgerðina av málinum.<br>*Stk. 8.* Avgerðir sambært hesi lóg kunnu ikki kærast til annan fyrisitingarmyndugleika. | **§ 33**<br><br>Í løgtingslóg nr. 29 frá 8. apríl 2005 um umskipan av landsskatta-, mvg- og tollskuld v.m. hjá fólki (Skuldarumskipanarlógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 og løgtingslóg nr. 193 frá 10. desember 1993, verður § 8 orðað soleiðis:<br><br>"**§ 8.** Føroya Kærustovnur viðger og tekur avgerðir sambært hesi løgtingslóg.<br>*Stk. 2.* Føroya Kærustovnur hevur heimild at útvega sær neyðugar upplýsingar um fíggjarstøðuna hjá umsøkjara og annars upplýsingar, ið eru neyðugar fyri viðgerðina av málinum.<br>*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um beinleiðis atgongd til upplýsingarnar sambært stk. 2.<br>*Stk. 4.* Avgerðir sambært hesi løgtingslóg kunnu ikki kærast til annan fyrisitingarmyndugleika." |

| | |
|---|---|
| | **§ 34**<br><br>Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. juli 2022. Samstundis fer løgtingslóg nr. 110 frá 13. desember 2006 um kærunevnd í lendismálum og løgtingslóg nr. 17 frá 8. mai 2008 um Vinnukærunevnd úr gildi. |